gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Lítið rásarúm til børn við serligum tørvi



*– Vistu vit, at undirtøka fekst fyri eini skilagóðari verkætlan, høvdu vit ikki drálað við at gjørt eitt tilmæli til myndugleikarnar. Øvugta støðan ger, at vit ikki biðja um nakað, um vit ikki vita frammanundan, at pengarnir ikki fylgja við, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**– Veruligur vandi er fyri, at nøkur børn detta niður ímillum, soleiðis sum føroyski fólkaskúlin er í dag. Verða smærri skúlaeindir gjørdar til børn við trupulleikum, fáa hesi møguleika at læra nakað. Tað gevur teimum eitt innihald í lívinum, sum lættir um trupulleikar teirra, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum**

BØRN OG HARÐSKAPUR
*Turið Kjølbro*

Føroyski fólkaskúlin, sum skal eitast vera fyri øll, hevur lítið rásarúm til børn, sum hava serligan tørv. Nýggja fólkaskúlalógin er ikki gjørd við atliti til hesi, sum hava ein serligan tørv, hóast hon leggur dent á, at frálæran skal taka støði í einstaklinginum. Lógin leggur í stóran mun upp til verkætlanar- og bólkaarbeiði, at næmingurin arbeiðir sjálvstøðugt og at lærarin ráðgevur í hesum sambandi.

Atferðartrupul børn, sum vit hava viðgjørt í blaðnum hesa vikuna, hava ilt við at klára seg í skipaðum samstarvi.

– Felags fyri børn, sum hava atferðartrupulleikar, er, at tey eru ógvuliga illa fyri, tá ið tað kemur til sjálvstøðugt arbeiði og at samstarva, sum nýggja lógin leggur upp til, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum.

Hóast bólkaarbeiði ikki er nýtt innan skúlagátt, var fólkaskúlalógin, ið var í gildi undan teirru nýggju, uppá nógvar mátar øðrvísi. Undirvísingin varð løgd til rættis eftir sama leisti sum altíð og børnini vóru ongantíð í iva um, hvussu skúladagurin fór at vera.

– Í slíkum samanhangi klára børn, sum hava serligan tørv, seg betur, sigur Hans Eli Dahl.

Sambært nýggju lógini skal undirvísingin taka støði í hvørjum einstøkum barni. Til tað krevst, at lærarin dugir at geva næminginum uppgávur og avbjóðingar til førleikastigið hjá viðkomandi, men sum kortini er í tráð við tað, hini í flokkinum takast við.

– Men tað er lættari sagt enn gjørt. Tað er ikki minni torført eftir nýggju lógini, sum leggur so stóran dent á arbeiði í bólki. Tí er ein veruligur vandi fyri, at nøkur børn detta niður ímillum. Tey mistrívast í skúlanum og koma í eina ónda ringrás, sigur Hans Eli Dahl.

At børnini fakliga ikki klára at fylgja við í skúlanum, ger, at trupulleikar teirra verða verri.

– Tað er ikki grundleggjandi orsøkin til atburðin, men virkar við til, at atburðurin verður trupul.

## Nógvar orsøkir

Hvør orsøkin er til, at nøkur børn á henda hátt detta niður ímillum, eru fleiri meiningar um. Tosað verður um íbornar orsøkir, tað vil siga viðføddar neurologiskar og biologiskar orsøkir, umfram sosialar orsøkir.

– Tað kann hava nakað við menningar- og persónleikafrávik at gera. Í teim ringastu dømunum vit kenna í Føroyum, er niðurstøðan eftir kanningar, og sálarfrøðiligar og læknaligar útgreiningar tann, at tað er eitthvørt í barninum sjálvum sum ger, at tað fær atferðartrupulleikar. Hvat tað er, vita vit ikki.

Uttan mun til, hvør orsøkin er, vísa eyðkennini seg nøkulunda eins, tó í størri og minni mun.

– Tað eru børn, sum mest eru órógvandi fyri seg sjálvi, og so eru tað onnur, sum í størri mun órógva onnur. Umframt eru tað tey, sum gerast harðlig, brúka makt og fáa berserkaragongd. Nøkur missa vitið í berserkaragongdini og fáa herðindi, og siga aftaná, at tey vistu ikki, hvat tey gjørdu.

Sernámsdepilin hevur ikki fingið nakra læknaliga frágreiðing, hví talið á børnum, sum fáa ein ógvusligan og harðligan atburð heima og í skúlanum, veksur í tali seinnu árini.

– Tað er eitthvørt uppi í tíðini, men hvat veit eg í grundini ikki nágreiniliga. At nógv foreldur ikki hava stundir at taka sær av sínum børnum og tey ganga fyri vág og vind og føla seg forsømd, kann vera ein orsøk. Men vit síggja jú eisini, at nógv børn, sum fáa ein truplan atburð, koma úr heimum, har tey hava tað gott uppá allar mátar.

Tá ið Hans Eli Dahl sipar til tíðina, vit liva í í dag, hugsar hann um krøvini, sum verða sett til okkum øll.

– Onkusvegna kenna børnini á sær, at tey hóska ikki inn í kravmynstrið. Tey føla, at tey røkka ikki til.

## Samskifti og samstarv

Skúlarnir hava skyldu til at boða frá, tá børn fremja harðskap á skúlanum ella í aðrar mátar hava eina hóttandi atferð. Men ov long tíð gongur frá tí ein ógvusligur tilburður er farin fram, til Sernámsdepilin frættir um hann, sigur Hans Eli Dahl.

– Fyri at finna út av, hvat í veruleikanum fer fram og hvat liggur aftanfyri ein slíkan tilburð, skal eitt stórt útgreiningararbeiði til. Hetta krevur, at fólk á skúlunum, eitt nú serlærarar, hava innlit í hesi viðurskifti og kenna mannagongdir til at útgreina slíkt. Ein sálarfrøðingur má vera við líka frá byrjanini.

Tað eru foreldrini sum saman við skúlanum og ráðgevingini við einum sálarfrøðingini, sum eru best før fyri at meta um, hvat barninum bagir og hvørja hjálp tað tørvar.

– Hetta er ein rættiliga drúgv og krevjandi prosess, ikki minst tí tað mangan snýr seg um at semjast um tað sum fer fram, sigur Hans Eli Dahl, sum av royndum veit, at samskiftið millum foreldur og skúla mangan haltar í langa tíð, tí bæði hava lyndi til at geva hvør øðrum skyldina.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



## Ov lítil orka

Ov fáir lærarar við serútbúgving eru á føroysku skúlunum, eingin sálarfrøðingur er knýttur at nøkrum skúla, og á Sernámsdeplinum, sum varðar av øllum børnum í Føroyum í aldrinum 0 til 18 ár, eru bert tveir sálarfrøðingar.

– Almannaverkið eigur hava nóg mikið av fakfólki, herundir sálarfrøðingar, og sjúkrahúsverkið eigur eisini at hava eina munadygga barnapsykiatriska tænastu. Familjan hjá einum barni við atferðartrupulleikum er mangan so illa fyri, at hon má fáa almennan stuðul upp á ein ella annan máta. Tað er sera umráðandi, at innsatsurin til barnið hongur saman og at tikið verður um alla heildina. Serliga atferðartrupul børn tørvar terapeutiska viðgerð av sálarfrøðingi og tað tekur oftast langa tíð.

– Samstarvið millum skúlaverkið og almannaverkið í dag er alt ov stívt og avmarkað av óhepnum reglum. Hetta er avgjørt ein forðing í okkara arbeiði.

## Allur bati bøtur

Áðrenn eitt sertilboð til børn við atferðartrupulleikum og til børn, sum annars ikki klára seg í einum vanligum skúla, verður veruleiki, eigur orka beinanvegin at verða sett inn í skúlarnar til einstaka barnið, sum tørvar hjálp. Eitt nú soleiðis, at ein lærari burtur av kann taka sær av einum næmingi annað hvørt inni í flokkinum ella uttanfyri, heldur Hans Eli Dahl.

– Hesar tímarnar hava vit ikki uttan víðari til taks.

Sernámsdepilin ræður yvir eini kvotu av tímum til serligan tørv, sum Mentamálastýrið á hvørjum ári setur talið á. Hetta eru tímar til øll børn í føroyska skúlanum. Menningartarnað, rørslutarnað, næmingar við atferðartrupulleikum og serligum innlæringartrupulleikum. Skúlarnir søkja hvørt ár tímar, og verða allir tímarnir lutaðir út eina ferð um árið, eru ongir eftir til serligar støður, sum kunnu stinga seg upp í skúlaárinum. Í ár hevur Sernámsdepilin søkt um gott og væl 2500 tímar, men hevur fingið slakar 1200 tímar, sum er nøkulunda sama tal sum í fjør.

– Allar umsóknirnar um tímar til serligan tørv eru væl grundaðar og rímiligar, men vit hava verið noydd at lúka burtur úr. Eingin skúli hevur fingið tað sum søkt er um. Onkur skúli hevur bara fingið ein triðing.

Ein gongd leið at finna fram til eitt nýtiligt serskúlatilboð, er í fyrsta umfari at veita eitt størri tal av tímum til serligan tørv.

– Í Havn hevur tankin um at gera ein flokk til hesar næmingar verið frammi, og tað er eitt gott hugskot. Í einum minni bólki við 6-8 næmingum og trimum lærarum er lættari at leggja undirvísingina til rættis. Tá fáa børnini veruliga møguleika at læra nakað, tað er gott fyri sjálvsálitið og tað gevur teimum eitt innihald í lívinum, sum ger, at trupulleikar teirra fána eitt sindur. Endamálið skal ongantíð vera at avbyrgja næmingarnar, men heldur at hjálpa teimum inn í eina positiva ringrás. Yvirornaða málið skal vera at hjálpa teimum at samstarva við onnur.

## Tung skipan

Ivamálið um, hvør skal fíggja skúlagongdina hjá hesum næmingum, um tað er av kvotuni hjá Sernámsdeplinum til tímar til serligan tørv ella av játtanini hjá hvørjum einstøkum skúla, ger, at eingi útlit eru til, at ein serflokkur verður stovnaður í bræði.

– Eftir okkara tykki eigur ein slíkur flokkur at vera ein partur av skúlaskipanini. Tað er avmarkað, hvat vit kunnu mæla myndugleikunum til í hesum sambandi, tí játtanin til Sernámsdepilin er avmarkað. Mæla vit til, at eitthvørt verður gjørt, kunnu vit rokna við, at tað skal gerast innan fyri verandi játtan. Stovnurin fær alla tíðina fleiri uppgávur, men játtanin er hin sama. Játtanarskipanin er ógvuliga tung og í grundini køvandi. Vistu vit, at útlit eru til, at undirtøka fekst fyri eini skilagóðari verkætlan, høvdu vit ikki drálað við at gjørt eitt tilmæli til myndugleikarnar. Øvugta støðan ger, at vit skulu ikki biðja um nakað, um vit ikki vita frammanundan, at pengarnir ikki fylgja við, sigur Hans Eli Dahl.

Skjót hjálp er góð hjálp, men sum útlitini eru á Sernámsdeplinum í dag, bíða børn í alt ov langa tíð, áðrenn tey kunnu koma til sálarfrøðing ella kanning. Í dag bíða um hálvt hundrað børn eftir at koma til vanliga sálarfrøðiliga kanning, og bíðitíðin er hálvt ár til eitt ár. Stovnurin hevur í fleiri ár víst á tørvin uttan at hann hevur fingið størri játtan til at seta fleiri fólk.

# At mold skal tað verða



**Innihaldið úr reinsibrunnunum á Gjányri verður brúkt til mold í Svínáhaganum hinumegin Sundalagið**

ENDURNÝTSLA
*Edvard Joensen*

**Svínáir:** Beint norðan fyri Kross millum Svínáir og Ljósá er ein gravimaskina í ferð við at leggja rottangaevju út á helluna. Ætlanin er, at hellan skal gerast til grønan haga um eini tvey ár.

Túrurin er eitt sindur drúgvur, áðrenn grasið fer at vaksa á helluni millum Kross og Líknir. Men tá liðugt er, kann sigast, at helst eingin hevur gjørt tað lort. Heldur tvørurímóti.

Tað byrjaði við, at onkur onkunstaðni í økinum hjá IRF trongdi til at loysa sær buksurnar. Farið varð í wc og skolað niður í rottangan, tá liðugt var.

Síðan lá tað, sum farið var, í tanganum og bíðaði eftir bilinum, sum kom at tøma tangan.

Tangabilurin tømdi so alt aftur í reinsabrunnin í grótbrotinum á Gjányri, har tað fór í gjøgnum eina blandimaskinu, meðan kálk varð latið í alla evjuna. Síðan lá tað í hesum reinsitanganum og fór í gjøgnum eina kemiska prosess, til PH virði lá oman fyri 12, og avfallið var púra reinsað fyri bakreriur.

Tá alt hetta var av eini tvey ár eftir, at evjan var komin í reinsitangan, varð hon tikin upp aftur og flutt við lastbili yvir um Sundið og stroydd út eftir helluni norðan fyri Kross.

Gravkúgvin slættar tilfarið út eftir helluni, og síðan verður grasfræ sátt í. Økið er avhegnað, og skal verða tað í hálvtannað ár ella so, áðrenn latið verður uppaftur, so seyðurin sleppur at royna grasið, sum fer at vaksa har, sum hella áður hevur verið.

Ingvard Fjallstein á brennistøðini hjá IRF í Leirvík sigur, at her er farið fram eftir teimum reglum, sum galdandi eru. Øll loyvi eru fingin til vega fyri at gagnnýta evjuna úr rottangunum til haga í Svínáum.

Hann sigur, at loyvini eru latin av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, eins og eigararnir av haganum hava játtað at brúka økið.

Vanliga er kravið, at slíkt øki skal liggja avhegnað í eitt ár, áðrenn tað verður latið uppaftur, sigur Ingvard Fjallstein. Men í hesum førinum hava teir avrátt við eigararnar at lata økið liggja í hálvtannað ár, soleiðis at tað verður friðað eitt summar aftrat.

Hetta er ikki nakað, sum nýliga er íkomið, soleiðis at enduvinna tað, fólk kasta av sær. Fyrr hevur tað verið brúkt á tyrvingarplássunum hjá IRF,sigur Ingvard Fjallstein. Men tey eru fækkað so nógv nú, at aðrir møguleikar máttu finnast. Og hesin var so ein, sum allir partar tykjast nøgdir við, sigur hann.